ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3Postboks 208
110 Tórshavn

26. apríl 2022
Mál: 22/07430-4
Tygara Skriv:
Viðgjørt:

Nr. 52-168/2021

Svar upp á § 52a fyrispurning nr. 52-168/2021 frá Sirið Stenberg, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í almannamálum Sólvit E. Nolsø, um sparingar í Almannaverkinum

Fyrispurningurin ljóðar soleiðis:

1. Hvussu nógvar borgarar fara sparingarnar í Almannaverkinum at raka? Biðið verður um tøl fyri ymisku tænasturnar so sum umlætting, stuðul og hvussu nógv fólk fáa skert tænastustøði.
2. Kann landstýrismaðurin upplýsa, hvussu ymisku bíðilistarnir til tænastu í Almannaverkinum síggja út, býtt á tal á fólki til ymisku bíðilistarnar?
3. Fara skerjingarnar í tænastustøðinum at standa við, hóast eykajáttanarumbønin, sum liggur í Fíggjarnevndini, verður samtykt?
4. Metir landsstýrismaðurin, at tað ber til at gera sparingar í Almannaverkinum soleiðis, at tær ikki raka tænastuna til borgaran við serligum tørvi?

Til nr. 1
Sambært Almannaverkinum, ber ikki til at svara hesum spurningi ítøkiliga, tí Almannaverkið arbeiðir áhaldandi við at tryggja, at sparingarnar koma at raka so fáar borgarar sum yvirhøvur møguligt, og tænasturnar minka so lítið sum møguligt. Viðmerkjast kann, at Almannaverkið hevur verið alment frammi og tosað um, at møguliga er talan um 50 – 100 brúkarar.

Til nr. 2
Niðanfyri er bíðilistin frá síðst í mars 2022. Viðmerkjast skal, at sami borgari kann koma fyri fleiri ferðir, í teimum førum hann hevur søkt um fleiri ymiskar tænastur.

Tænasta	Tal
§ 46 Vardur bústaður	
Sambýli	84
Búfelagsskapur	77
Røktarbústaður	4
§ 45 Fyribils bústaður	
bústovnur/viðgerðarstovnur	23
stovnslíknandi fyriskipan	1
§ 35 Stuðulstænasta	
námsfrøðilig leiðbeining	39
vøka og hjávera	3
§ 41 Umlætting	
samdøgursumlætting	47
§ 40 Virknistænasta frá 10 ár	
Frítíðartilboð	32
vardur verkstaður	8
Íalt	**318**

Til nr. 3

Eykajáttanarumbønin til Trivnaðartænastur, ið er til viðgerðar í Løgtinginum, fevnir um nøkur ítøkilig mál og ikki um nevndu skerjingar, sum fevna um tænastur til aðrar borgarar innanfyri Trivnaðartænasturnar.

Biðið verður um 6 mió. kr. til tvær einstaklingafyriskipanir, tvey børn við ávísari sjúku og eina nýggja fyriskipan, sum er bráðfeingis.

Harumframt verður biðið um umleið 7,3 mió. kr. vegna meirútreiðslur í sambandi við COVID-19 og 0,5 mió. kr. vegna hækking í oljuprísum.

Til nr. 4

Sparingar eru gjørdar, sum ikki raka tænastuna beinleiðis. Í mun til fíggjarætlanina er talan um eina munandi skerjing í viðlíkahaldi og í rakstrargøgnum so sum bilum. Harumframt verður skert nógv í førleikamenningini av starvsfólkum. Hesar sparingarnar hava tó við sær økt slit av bygningum og rakstrargøgnum. Vantandi førleikamenning av starvsfólki fer við tíðini at ávirka tænastustigið til tað verra, umframt at skapa verri trivnað hjá starvsfólkunum.

Almannamálaráðið, 26. april 2022

Sólvit E. Nolsø
landsstýrismaður